SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Tinganes, hin. xx 2019
Málsnr.:xxxxx

**Upprit til landsstýrisfund**

**Um at biðja landsstýrið um undirtøku fyri, at Samferðslumálaráðið ger rundskriv, sum áleggur øllum stjórnarráðunum og stovnum undir landinum at seta treyt til fyritøkur í samband við viðlíkahald og ný- og umbygging, sum greitt frá í hesum uppriti**

**Orsøk til at málið verður tikið upp**
Trípartasamráðingar hava verið í vár, har Mentamálaráðið, Løgmansskrivstovan, Fíggjarmálaráðið og Samferðslumálaráðið hava luttikið saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Endamálið við trípartasamráðingunum hevur í stuttum verið at skapa eitt støðugari lærlingatal. Undir samráðingunum vórðu partarnir m.a. samdir um, at tá ið stjórnarráð og stovnar undir landinum bjóða út arbeiði í samband við viðlíkahald og ný- og umbygging, skal tað vera ein treyt, at fyritøkurnar, sum bjóða upp á arbeiðið, skulu útbúgva lærlingar.

**Málslýsing**
12. september 2018 varð álit um endurskoðan av yrkisútbúgvingarøkinum handað. Í álitinum vóru 7 tilmælir til, hvussu yrkisútbúgvignarøkið kann betrast. Fyri at øll hesi tilmæli kunnu verða sett í verk, varð farið undir trípartasamráðingar. Hetta er fyrstu ferð, at trípartasamráðingar hava verið í Føroyum. Partarnir hava samráðst um eina avtalu, har arbeitt verður við einum konjunkturútjavnandi samstarvi í millum almennar myndugleikar og arbeiðsmarknaðin, sum fer at føra til eina støðugari tilgongd av lærlingum yvir ár. Hetta fer at gera yrkisútbúgvingartilboðið støðugari, yrkisútbúgvingarskipanina lættari at umsita og góðskustøðið á útbúgvingunum støðugari. Ein liður í avtaluni er, at tá ið stjórnarráð og stovnar undir landinum bjóða út arbeiði í samband við viðlíkahald og ný- og umbygging, skal tað vera ein treyt, at fyritøkurnar, sum bjóða upp á arbeiðið, hava átikið sær at útbúgva yrkislærd.

**Metingar um loysn/ir**
Fyri at uppfylla hendan partin av trípartaavtaluni er neyðugt, at tað verður álagt øllum stjórnarráðum og stovnum undir landinum at seta sum treyt, at bert fyritøkur, sum útbúgva lærlingar, kunnu bjóða upp á arbeiðir við viðlíkahaldi og ný- og umbygging. Talan verður um eina prekvalifikatión, og ætlanin er ikki, at tað skal vera ein liður í vektingini av innkomnum tilboðum, at fyritøkan hevur lærlingar. Um fyritøkan ikki hevur nakran lærling, tá ið boðið verður upp á arbeiðir, skal fyritøkan kunna vísa á, at hon tey seinastu 5 árini hevur útbúgvið yrkislærd. Er talan um nýggjar ella útlendskar fyritøkur, skulu hesar lýsa, hvussu tær fara at taka ábyrgd av at útbúgva lærlingar gjøgnum arbeiðið, ið boðið verður uppá.

Hetta kann vera gjørt við einum rundskrivi, har landsstýrismaðurin í Samferðslumálum áleggur øllum stjórnarráðunum og stovnunum undir landinum at fylgja avtaluni, sum landið og partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gjørt, tá ið arbeiðir við viðlíkahaldi og ný- og

umbygging verða boðin út. Heimild er til hetta, um eg fái samtykki til tess á landsstýrisfundi sbrt. § 30, stk. 2, nr. 2 og 5 í fráboðan nr. 109 frá 18. september 2015 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar.

**Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar**
Mett verður ikki, at rundskrivið fer at hava stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri stjórnarráð ella stovnar undir landinum. Neyðugt verður í samband við útbjóðing av viðlíkahaldsarbeiði og arbeiði við ný- og umbygging, at sett verður sum ein treyt í útbjóðingartilfarið, at fyritøkurnar, sum bjóða upp á arbeiðið, útbúgva lærlingar.

**Viðmerkingar frá landsstýrismanni/monnum, sum uppskotið fær avleiðingar fyri**
Landsstýriskvinnurnar í mentamálum og fíggjarmálum, løgmaður og eg sjálvur hava verið við í trípartasamráðingunum, og vit vóru samd um, at treyt skal setast til fyritøkur, sum bjóða upp á almenn arbeiðir við viðlíkahaldi og ný- og umbygging, at hesar útbúgva lærlingar. Hini landsstýrisfólkini hava ikki fingið uppskotið til ummælis.

**Niðurstøða**
Eg ætli at gera omanfyri umrødda rundskriv, um tað verður samtykt á hesum fundinum.

Heðin Mortensen
landsstýrismaður

**Samferðslumálaráðið**

**Lógartænastan**

Dagfesting: Skrivið her
Mál nr.: Skrivið her
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Rundskriv um at seta treyt til fyritøkur í sambandi við útbjóðing av viðlíkahaldi og ný- og umbygging hjá stjórnarráðum og stovnum undir landinum**

(Til stjórnarráðini og stovnarnar undir landinum)

**1. Heimild**
1.1. Við heimild í § 30, stk. 2, nr. 2 og 5 í fráboðan nr. 109 frá 18. september 2015 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, og eftir at hava fingið samtykki til tess á landsstýrisfundi, verður ásett:

1.2. Í sambandi við útbjóðing av arbeiði við ný- og umbygging og viðlíkahaldi skulu stjórnarráðini og stovnarnir undir landinum taka hædd fyri avtalu, sum er gjørd millum landið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Avtalan er løgd sum skjal 1 til hetta rundskriv.

**2. Gildiskoma**
2.1. Landsstýrismaðurin hevur á landsstýrisfundi tann xx. xxx 2019 fingið undirtøku fyri at seta hetta rundskriv í gildi.

2.2. Rundskrivið kemur í gildi xx.xx.2019.

Samferðslumálaráðið, dagfesting

**Heðin Mortensen**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen

**Skjal 1**

**Avtalan skal setast inn her.**